gult cyan magenta svart



# Hósdagur 29. mars

## SVF

| | |
|---|---|
| 18.30 | Pinkupól 4 |
| 18.35 | Jumanji 9 |
| 19.00 | Úlvur í seyðaskinni |
| 19.10 | Basalt (e) |
| 20.00 | Dagur og Vika við Grannum okkara |
| 20.50 | Ferðaliðið 12:30 donsk dramarøð |
| 21.50 | Sprintararnir í Kalahari oyðimørkini – náttúrusending |
| 22.20 | Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 – ensk røð |
| 23.10 | DR-Dokumentar: Søgur av einari politistøð |
| 00.10 | Liðugt |

## Eurosport

| | |
|---|---|
| 07:30 | Tennis |
| 08:30 | Golf |
| 09:30 | Olympic Games |
| 10:00 | Snowboard |
| 10:30 | Trial |
| 11:30 | Car Racing |
| 12:30 | Football |
| 14:30 | Tennis |
| 15:45 | Cycling (Live) |
| 17:15 | News |
| 17:30 | Xtreme Sports |
| 18:00 | Football |
| 20:00 | Tennis |
| 20:30 | Tennis |
| 22:00 | News |
| 22:15 | Football |
| 23:15 | Football |
| 00:15 | News |
| 00:30 | Close |

## BBC Prime

| | |
|---|---|
| 00.00 | Tlz American Visions |
| 01.00 | Tlz White Heat |
| 02.00 | Tlz What Have The 60s Ever Done For Us? |
| 02.10 | Tlz Background Brief: Our Biggest Smallest. |
| 02.30 | Tlz Elements Of Healing |
| 03.00 | Tlz The Next Big Thing: Nanotechnology |
| 03.30 | Tlz A Formidable Foe |
| 04.00 | Tlz Mexico Vivo |
| 04.30 | Tlz Zig Zag: Ancient Greece |
| 04.50 | Tlz Troubleshooter |
| 05.30 | Tlz The Ozmo English Show |
| 06.00 | Toucan Tecs |
| 06.10 | Playdays |
| 06.30 | Insides Out |
| 06.55 | The Really Wild Show |
| 07.30 | Ready Steady Cook |
| 08.00 | Style Challenge |
| 08.25 | Change That (Set 01) |
| 08.50 | Going For A Song |
| 09.30 | Top Of The Pops Plus |
| 10.00 | Antiques Roadshow |
| 10.30 | Tlz Science At War |
| 11.30 | Country Tracks |
| 12.00 | Ready Steady Cook |
| 12.30 | Style Challenge |
| 13.00 | Doctors |
| 13.30 | Eastenders |
| 14.00 | Change That (Set 01) |
| 14.25 | Going For A Song |
| 15.00 | Toucan Tecs |
| 15.10 | Playdays |
| 15.30 | Insides Out |
| 15.55 | The Really Wild Show |
| 16.30 | Totp Eurochart |
| 17.00 | Changing Rooms |
| 17.30 | Doctors |
| 18.00 | Eastenders |
| 18.30 | Animal Hospital |
| 19.00 | Dinnerladies |
| 19.30 | Blackadder The Third |
| 20.00 | Casualty |
| 21.00 | Absolutely Fabulous |
| 21.30 | Totp Eurochart |
| 22.00 | Au Pairs |
| 22.50 | Au Pairs |
| 23.40 | Doctor Who: Snakedance |

## BBC World

| | |
|---|---|
| 00.00 | BBC News |
| 00.30 | HARDtalk (r) |
| 01.00 | BBC News |
| 01.30 | Holiday (r) |
| 02.00 | BBC News |
| 02.30 | Reporters (r) |
| 03.00 | BBC News |
| 03.30 | Asia Today (r) |
| 03.45 | World Business Report (r) |
| 04.00 | BBC News |
| 04.30 | HARDtalk (r) |
| 05.00 | BBC News |
| 05.30 | Top Gear (r) |
| 06.00 | BBC News |
| 06.30 | Reporters (r) |
| 07.00 | BBC News |
| 07.30 | HARDtalk |
| 08.00 | BBC News |
| 08.30 | Talking Movies (r) |
| 09.00 | BBC News |
| 09.30 | The Money Programme (r) |
| 10.00 | BBC News |
| 10.30 | HARDtalk (r) |
| 11.00 | BBC News |
| 11.30 | Holiday (r) |
| 12.00 | BBC News |
| 12.30 | The Money Programme (r) |
| 13.00 | BBC News |
| 13.30 | HARDtalk (r) |
| 14.00 | BBC News |
| 14.15 | World Business Report |
| 14.30 | Top Gear (r) |
| 15.00 | BBC News |
| 15.30 | The Money Programme (r) |
| 16.00 | BBC News |
| 16.30 | Asia Today |
| 17.00 | BBC News |
| 17.15 | World Business Report |
| 17.30 | Talking Movies (r) |
| 18.00 | BBC News |
| 18.30 | World Business Report |
| 18.45 | World Sport |
| 19.00 | BBC News |
| 19.30 | HARDtalk (r) |
| 20.00 | BBC News |
| 20.30 | Click Online |
| 21.00 | BBC News |
| 21.30 | World Business Report |
| 22.00 | BBC News |
| 22.30 | Panorama |
| 23.00 | BBC News |
| 23.30 | World Business Report (r) |
| 23.45 | Asia Today |

## 3 Viasat

| | |
|---|---|
| 05:00 | Børne-hjørnet med Disney |
| 07:05 | TV-shop |
| 08:30 | Garfield og venner |
| 08:55 | Sunset Beach |
| 09:45 | Træneren |
| 10:15 | Horton-sagaen (G) |
| 11:05 | Horton-sagaen |
| 11:55 | Melrose Place - classic |
| 12:50 | Vild med dig |
| 13:20 | Panter-tanter |
| 13:50 | Vestens hårde drenge |
| 14:45 | Baywatch |
| 15:40 | Min kære familie |
| 16:05 | Ricki Lake |
| 17:05 | Før Skjulte Spor |
| 17:10 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 17:30 | Baren (G) |
| 18:00 | Alle tiders barnepige |
| 18:30 | Baren |
| 19:00 | GRISK - når det gælder |
| 20:00 | Skjulte Spor |
| 21:00 | TV Razzia |
| 21:30 | Ace Ventura - detektiv |
| 23:10 | Baren (G) |
| 23:40 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 23:50 | Vore værste år |
| 00:20 | Simpsons |
| 00:50 | Ellen |
| 01:20 | Kojak |
| 02:20 | I lyst og nød |
| 02:45 | Drøm videre |
| 03:15 | Ellen (G) |
| 03:40 | Ricki Lake (G) |
| 04:40 | Godnat |

## Útvarp Føroya

| | |
|---|---|
| 07.00 | Tíðindi |
| 07.05 | Morgunlestur Andras Danielsen á Strondum lesur |
| 07.15 | Barnaløtan Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 07.30 | Tíðindi |
| 07.35 | Morguntónleikur |
| 08.00 | Tíðindi |
| 08.03 | Morgunrásin |
| 09.00 | Tíðindi |
| 09.03 | Morgunrásin |
| 09.50 | Morgunlestur (e) Andras Danielsen á Strondum lesur |
| 10.00 | Tíðindi |
| 10.03 | Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri |
| 11.00 | Tíðindi |
| 11.03 | Ferðin til Zambora (e) Hans Tórgarð lesur 2. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála. |
| 11.30 | Undir døgurða |
| 12.00 | Veðurtíðindi |
| 12.02 | Middagstónleikur |
| 12.15 | Skráin og lýsingar |
| 12.20 | Tíðindini |
| 12.40 | Døgurðatónar |
| 13.00 | Í grannalagnum (e) Óluva Zachariasen leggur til rættis |
| 13.30 | Tónleikur |
| 14.00 | Froskmaðurin, sum hvarv (e) Frásøgumynd, sum Árni Joensen skrivar. |
| 15.00 | Tíðindi |
| 15.03 | Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri |
| 16.00 | Tíðindi |
| 16.03 | Prix Føroyar í Miðvági (e) Ginna Midjord stílar fyri |
| 17.00 | Tíðindini |
| 17.05 | Í Víngarðinum Victor Carlsen leggur til rættis |
| 18.05 | Barnaløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 18.25 | Skráin og lýsingar |
| 18.30 | Tíðindini |
| 19.00 | Hetjur í Skriftini- Jósva hernaðarúrmælingurin Armgarð Arge leggur til rættis |
| 19.30 | Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri |
| 20.30 | Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri |
| 21.00 | Tíðindi |
| 21.05 | Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri |
| 22.00 | Rák Anita Ottosen stílar fyri |
| 23.00 | Tíðindi |

## Rás 2 FM 102 FM 107

| | |
|---|---|
| 10:45 | Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen |
| 11:00 | Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti |
| 12:00 | Tíðindi & Lýsingar |
| 13:00 | Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur |
| 14:00 | Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum |
| 15:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 15:15 | Ynskiløtan (framhald) |
| 16:00 | Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis |
| 17:00 | Norðlýsið! Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis. |
| 18:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 18:15 | Lættur tónleikur |
| 19:00 | Orð á leiðini EVR-sending "Bíblian – á okkara máli?". Jógvan Zachariassen leggur til rættis |
| 19:40 | Tónleikur |
| 21:00 | Tíðindi og lýsingar |
| 21:15 | Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen |
| 21:30 | Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo |

## Lindin

| | |
|---|---|
| 13.00 | Byrjan – Dagsskrá |
| 13.15 | Okkara dagliga breyð |
| 13.30 | Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e) |
| 14.30 | Tónleikur fyri børn |
| 15.00 | Tónleikur |
| 17.00 | Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku |
| 18.00 | Dagsins Orð |
| 18.05 | The Finishing Touch ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo |
| 19.00 | Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending. |
| 19.15 | The Finishing Touch heldur fram |
| 20.00 | "Við Honum út á Golgata" Upplestur úr bókini hjá Frederik Wisløff. Úr Jesusar líðingarsøgu. |
| 20.30 | Okkara dagliga breyð |
| 20.40 | Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum. |
| 20.55 | Dagsins Orð |
| 21.00 | Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana. |

Vit gevast uml. middnátt

## Sprintararnir í Kalahari oyðimørkini

*– týsk náttúrusending*

**SVF Hóskvøldið kl. 21.50**

Strussar hava sera sterk bein og kunnu renna undan flestu fíggindum sínum. Bara geopardurin fær hann aftur. Men ungarnir eru viðkvæmir og kunnu ikki verða foreldrini fyri uttan. Og tey risastóru eggini vilja bæði djórini og menniskjuni í Kalahari oyðimørkini hava.

## Hetjur í Skriftini- Jósva hernaðarúrmælingurin



**Hóskvøldið kl. 19.00**

Móses hevur nú leitt fólkið til Lovaða Landið. Men hann sleppur ikki sjálvur inn í landið, tí hann doyr. Hann velur sín eftirmann, og tað er Jósva. Jósva hevði verið trúfasti fylgisveinurin hjá Mósesi, og hann var 60 ár, tá hann byrjaði sítt virki. Hann var herleiðari og dómari í 28 ár.

## Ace Ventura

*– Amerikanskur skemtifilmur frá 1994*



**Hóskvøldið kl. 21.30**

Tann sera løgni privatdetektivurin Ace Ventura tekur sær av málum, ið hava við djór at gera, tí honum dámar væl djór. So tá maskotturin hjá Miami Dolphins – delfinin Snowflake – verður stolin, er Ace beinanvegin á málinum.

gult cyan magenta svart



bandsflokkinum:

# ur fríggjakvøldið



ar atkvøður í part. 11 eru eftir at deila. Bæði virða tey fólkaræðisligu avgerðina, um hin vinnur

*Mynd: Jens Kristian Vang*

streymoynni hevur boðað Lisbeth L. Petersen frá, at tað stuðlar henni við sínum fimm atkvøðum. Tær fimm atkvøðurnar úr Eysturoynni fara helst eisini til Lisbeth, umframt at hon fær atkvøðuna frá verandi næstformanni og helst eisin onkra aðra atkvøðu úr starvsnevndini, umframt sína egnu millum tinglimirnar og helst eisini teirri hjá Alfred Olsen.

Tískil kann væntast, at Lisbeth L. Petersen kann vera vís í teimum fyrstu 20 atkvøðunum.

### Heðin stuðlar Edmundi

Kampval er eisini um næstformanssessin. Trygvi F. Guttesen hevur boðað frá, at hann stillar ikki upp aftur til næstformansvalið. Men samstundis hava tinglimirnir Heðin Mortensen og Alfred Olsen boðað frá, at teir stilla upp til formansvalið.

Sosialurin veit frá keldum innarliga í Sambandsflokkinum, at Heðin Mortensen stuðlar Edmundi Joensen og stillar upp til næstformansvalið fyri at draga atkvøður til Edmund Joensen til formansvalið. Sostatt hongur valið um næstformannin tætt saman við valinum um formannin, eins og valið um varaforsetan hongur saman við valinum um forsetan í USA.

Stillararnir hjá Heðini Mortensen eru Andras Miðskarð og Manni W. Høgnesen úr Norðoya Sambandsfelag, Bárður Nielsen og Holgar Hansen, úr Norðstreymoyar Sambandsfelag, Jógvan Jensen og Petur Weihe úr Føroya Væl, Jørmund Olsen, úr Sandoyar Sambandsfelag og Zacharias Bech og Sofus Strøm úr Suðuroyar Sambandsfelag.

Er tað rætt, at Heðin Mortensen stillar upp sum næstformanskandidatur hjá Edmundi Joensen, kunnu vit rokna við, at Edmund Joensen fær meginpartin av atkvøðunum frá hesum feløgum, umframt sína, teirri hjá Flemming Mikkelsen, teirri hjá Marjus Dam og teirri hjá Heðini Mortensen millum tinglimirnar.

Sostatt kann Edmund Joensen vera vísur í góðum 20 atkvøðum.

### Líkist '98

Í 1998 var eisini kampval um formanssessin í Sambandsflokkinum. Tá gjørdi Jóhannes Martin Olsen av at stilla upp ímóti Edmundi Joensen. Valið var ógvuliga javnt, men tað eydnaðist Edmundi at vinna ein tepran sigur við 32 atkvøðum móti 26.

Tað ber ikki til hjá okkum at siga, hvør fer at vinna í kvøld. Men vit kunnu staðfesta, at talan fer at verða um eitt líka spennandi val. Tað eru tilsamans 51 atkvøður í Sambandsflokkinum, og Edmund Joensen og Lisbeth L. Petersen hava longu tryggjað sær 20 í part. Tískil kemur býtið av teimum 11 atkvøðunum, sum eru eftir, at avgera valið.



*Lisbeth L. Petersen vónar, at tað fer at bera til hjá henni, sum nýggjari mynd úteftir, at betra um umdømi Sambandsfloksins. Flokkurin skal seljast betri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Lisbeth L. Petersen:

## Vil vera nýtt andlit

**Sambandsflokkurin treingir til eitt nýtt andlit úteftir. Tí hevur Lisbeth L. Petersen valt at taka av áheitanini at stilla upp til formansvalið**

FORMANSVAL
*John Johannessen*

Sambandsflokkurin er settur í bás, sum ein stirvin og afturhaldssinnaður flokkur.

Hetta heldur Lisbeth L. Petersen, sum hevur tikið av áheitan frá Unga Sambandinum um at stilla upp ímóti Edmundi Joensen til formansvalið í flokkinum.

– Eitt nýtt andlit í formanssessinum kann møguliga betra um umdømið hjá flokkinum, so vit ikki longur verða sett í bás, sum tey, sum einki vilja, sigur Lisbeth L. Petersen.

Nýggja formansvalevnið leggur tó doyðin á, at hon ikki heldur verandi formann, Edmund Joensen vera beinleiðis orsøk til vánaliga umdømið floksins.

– Hetta er bara eitt umdømi, vit hava fingið. Og ein loysn at betra um tað er møguliga at fáa nýggjan formann. Hetta kann tykjast órættvíst móti Edmundi Joensen, men soleiðis er politikkur. Hetta er ein hørð verð, staðfestir Lisbeth L. Petersen.

Lisbeth L. Petersen torir ikki at siga, um hon fer at vinna valið, men hon ætlar at gera eina roynd. Hon tekur formansvalið, sum eina avbjóðing, og vinnur hon ikki, fer hon ikki í kolkjallaran.

– Eg eri ógvuliga errin av, at tað eru tey ungu, sum hava stillað meg upp. Hetta kenni eg sum eina veruliga álitisváttan, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hóast hetta er fyrstu ferð, at Lisbeth stillar upp til formansvalið í Sambandsflokkinum, er tað ikki fyrstu ferð, at hon hevur fingið áheitanina. Hon er fleiri ferðir biðin um at stilla upp, men ikki fyrr enn nú helt hon løtuna vera ta røttu.

Lisbeth L. Petersen sigur seg hava lagt stóran dent á at spæl við opnum kortum til formansvalið. Hon kunnaði beinan vegin Edmund Joensen um ætlanina, tá hon hevði gjørt av at stilla upp.

Vinnur Lisbeth L. Petersen formansvalið, fer Sambandsflokkurin at vera lættari at tosa við, tá tað snýr seg um broytingar í ríkisrættarligu støðuni. Men Lisbeth ætlar sær ikki eitt vet út um ríkisfelagsskapin. Har er markið, sigur hon.

### Fakta

## Lisbeth L. Petersen

Fødd 28. februar 1939.

Foreldur: Rachel og Georg Lindenskov Samuelsen, Tórshavn.

Maður: Jákup Petersen, maskinmeistari, sonur Elsu og Jóannes Petersen, Signabø.

Útbúgving: Realprógv Tórshavn 1955. Studentsprógv Bagsværd Kostskole og Gymnasium 1958.

Yrki: Husmóðir. Fyrrverandi projektskrivari á Føroya Fornminnissavni.

Býráðslimur í Tórshavn síðan 1984, 1. næstformaður 1984-92, býráðsformaður 1992 - 1996.

Starvsstjórnarlimur (Sambandsflokkurin) 1980-90. Floksskrivari 1982-87. Nevndarlimur í "Føroya Væl" - veljarafelag Sambandsfloksins - 1989-2000, formaður 1997-99. Næstformaður í KSF - Kvinnufelagssamskipan Føroya 1982-86.

Varalimur á fólkatingi á heysti 1988.

Løgtingsmaður síðan 1990. 2. næstformaður í 1991 og 3. næstformaður í 1992.

Heimstaður: Handaratún 9, 100 Tórshavn.

*Kelda: www.logting.fo*